## Skálaberg góðan fiskiskap



Tað ljóðar frá góðum fiskiskapi hjá klaksvíkstrolaranum Skálaberg, sum fór í Barentshavið eftir toski beint fyri Ólavsøku. Teir hava verið á fiskileið í góðar tvær vikur og eru nú farnir upp um 100 tons. Á fabrikkini umborð framleiða teir vanligu flakavørurnar og harumframt er nú rættilig ferð komin á nýggju portiónsframleiðsluna.

Annars letur manningin væl at alsamt betraða telefon og internetsambandinum. Teir síggja Dag og Viku og hoyra Útvarp Føroya, og sum nakað rættliga forkunnugt fáa teir nú eisini prent av føroysku bløðunum við myndum og í litum.

Skálaberg roynir í løtuni á Gásabankanum í russiskum sjógvi, har veðrið hevur verið av tí allarbesta seinastu dagarnar.
*-ave-*

## I Am í Atlantis



Komandi fríggjakvøld fer gospelbólkurin I Am á pall í Atlantis. Tað er ikki so ofta, at I Am er at hoyra live í Føroyum fyri tíðina, tí at onkrir av limunum í bólkinum búgva uttanlands. Men nú fríggjakvøldið fer bólkurin so at hava eina konsert í Atlantis í Klaksvík. Hetta er í sambandi við serligu ítróttarnáttina, sum Klaksvíkar Ítróttarfelag skipar fyri.

I Am hevur verið vælumtóktur bólkur longi, men serliga síðani fløguna, sum teir góvu út í fjør, hevur bólkurin fingið luft undir veingirnar. Ummælini av fløguni vóru sera góð, og uttan iva verða fleiri av teimum løgunum at hoyra í Atlantis nú fríggjakvøldið. Konsertin byrjar klokkan 22.
*- sae -*

# Hundalív í Klaksvík

**Seinastu tíðina hava bæði Ansni og løgreglan í Klaksvík fingið nógvar fráboðanir um leysgangandi hundar, sum hava verið til ampa fyri fólk. Hetta er ein afturvendandi trupulleiki, sum skilst, og í farnu viku var eitt starvslið í Klaksvík og tók hundar**

LEYSIR HUNDAR
*Solby A. Eliasen,*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Fimm leysgangandi hundar vórðu tiknir upp í býnum í síðstu viku og koyrdir í hundabráhaldið. Hartil vóru eisini hundar, sum tað ikki eydnaðist Ansni at fáa fatur á.

Eisini gjørdi starvsliðið frá Ansni nakað av fyribyrgjandi arbeiði, har tey millum annað góvu hundaeigarunum, sum lótu teirra hundar ganga leysir við húsini, boð um at halda hundin innan fyri hegn ella í bandi.

Men hetta bøtti ikki so nógv um støðuna, sum kanska ynskiligt hevði verið, tí mánadagin var starvsliðið aftur úti, og tá tóku tey aftur fýra hundar. Umframt at ein hundur varð tikin inn í vikuskiftinum.

Í tíðindaskrivi frá Ansni verður sagt, at fólk, ið hava trupulleikar av hundum, kunnu venda sær til Politistøðina í Klaksvík tlf. 455348 ella til Ansni tlf. 505050.

Fólk, ið ivast um teirra burturblivni hundur er upptikin, kunnu venda sær til Politistøðina í Klaksvík, har møgulig útflýggjan av hundinum eisini verður gjørd.



*Ansni hevur tikið nógvar leysgangandi hundar upp í Klaksvík í farnu viku, og vórðu teir settir í hundabráhaldið*

# Tveir tímar bíðitíð

**Dúgvan flutti sum vera man heilt nógvar bilar og fólk um Leirvíksfjørð farna vikuskiftið. Hetta plagar at hava nakað av rokilsi við sær á ferjulegunum, men til Summarfestivalin varð eitt lið frá Ansni boðsent at avgreiða ferðsluna til Dúgvuna**

STRANDFERÐSLAN
*Solby A. Eliasen,*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tá stór tiltøk eru antin í Klaksvík ella aðrastaðni, er tað púra vanligt, at bilkaos er við ferjuleguna í Klaksvík. Til Summarfestivalin var eisini so, men talan var tó ongantíð um rættiligt kaos, tí tveir vaktarmenn frá Ansni avgreiddu ferðsluna, við at skipa so fyri, at bilar vóru settir rætt í kø.

Tað hevur verið trupult hjá manningini á Dúgvuni at halda skil á ferðsluni, tá nógvir bilar eru, tí teir hava jú sína uppgávu umborð at røkja. So tað mundi vera ein lætti fyri teir, at fólk gekk á kaiini og hevði eyguni eftir, at onki skeivt fór fram, og at ongin var noyddur at bíða, longri enn ein átti.

Annars vegleiddu vaktarmenninir teimum ferðandi, ið høvdu fyrispurningar viðvíkjandi siglingini hjá Dúgvuni sunnudagin.

Frá Ansni verður sagt, at alt gekk væl, men bíðitíðin at sleppa yvir um fjørðin var tveir tímar ella so. Hetta tókti tó ikki at nerva fólk tað stóra, tí tá so stór tiltøk eru á skránni, so munnu fólk helst vera greið yvir, at nakað av bíðitíð má vera, um ein hevur bilin við sær. Hóast Dúgvan silgdi eykatúr, so vórðu nakrir bilar standandi eftir á ferjuleguni seint sunnukvøldið.

### Langtíðarparkering

Ansni vísir somuleiðis á, at ein afturvendandi trupulleiki, hjá Strandferðsluni í Klaksvík, eru teir bilar, ið verða stillaðir í kø og førarin ikki møtir upp, til fráferðina hjá skipinum.

Og ein annar afturvendandi trupulleiki er somuleiðis, tá fólk byrja at brúka køplássið til langtíðar parkering av bilum.

Hesir báðir trupulleikarnir hava mangan elvt til øsing millum fólk, tá so mong skulu við Dúgvuni. Tí tað er komið fyri, at bilar hava staðið soleiðis fyri, at teir ikki eru slopnir við Dúgvuni, tí parkeraðir bilar við ongum førara hava staðið fyri.



# Bakur og Stelkur nýggjar slengrikjølar

**Fyri út við einum mánaða síðan fóru trolararnir, Bakur og Stelkur, til Spaniu til garantieftirlit. Í Spaniu verða eisini slengrikjølarnir skiftir út við nýggjar, soleiðis at skipini, sum hava rullað illa, kunnu gerast róligari í sjónum. Hetta hevur verið ein trupulleiki, síðan skipini komu til landið**

SKIP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan trolararnir, Bakur og Stelkur, komu sum nýbygningar úr Spaniu, hava skipini fiskað væl. Hetta eru góð skip við góðum fasilitetum til manningina. Men ein trupuleiki við skipunum hevur verið, at tey hava rullað so illa.

Olaf Olsen sigur, at teimum dámdi lítið, tá ið spanska skipasmiðjan, M.Cies í Vigo, helt uppá, at stabiliseringstangarnir skuldu liggja niðri í botninum á skipunum.

– Vit væntaðu ongantíð, at hetta fór at rigga serliga væl og trúðu tí heldur ikki uppá hetta. Útrokningar hjá spaniumonnum søgdu hinvegin, at hetta bar til. Royndirnar við skipunum, síðan tey fóru til fiskiskap, hava tó víst, at vit høvdu rætt, sigur Olaf og vísir á, at tað er ikki altíð, at útrokningar svara til veruleikan.

### Nýggjar kjølar

Nú skipini eru í Spaniu til garantieftirlit, hava tey eisini fingið nýggjar slengrikjølar sum skulu gera skipini róligari í sjónum.

Olaf Olsen sigur, at spanska skipasmiðjan sjálv ber kostnaðin av hesum arbeiði, tí hetta var ein »kiksari« hjá skipasmiðjuni, sum hann sjálvur tekur til.

– Nýggju slengrikjølarnir eru longri og øðrvísi enn teir, ið skipið upprunaliga hevði. Nýggju kjølarnir standa sum ein tríkantur inn á skipið við spíssinum úteftir.

Hann sigur, at slengrikjølar av hesum slagnum eru á onkrum føroyskum línuskipi, og teir vísa seg at rigga væl.

– Vit vænta og vóna tí, at skipini nú verða betri í sjónum, sigur Olaf Olsen.

Bakur og Stelkur fóru úr Føroyum, 22. juli og verða væntandi lidnir í Spaniu nú um vikuskiftið. Heimferðin tekur eini 5-6 samdøgur og so skjótt, skipini eru komin heimaftur, fara tey aftur til fiskiskap.

Í Spaniu eru skipini eisini málaði av nýggjum.



*Bakur og Stelkur fóru úr Føroyum til Spaniu, 22. juli og verða væntandi lidnir nú um vikuskiftið. Heimferðin tekur eini 5-6 samdøgur og so skjótt, skipini eru komin heimaftur, fara tey aftur til fiskiskap*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Samanlegging onga ávirkan

**Olaf Olsen sigur, at ognarviðurskiftini hjá partafelagnum Beta, sum rekur reiðaravirksemi og landingarmiðstøð í Saltangará, verða fullkomiliga óbroytt, nú Skipafelag Føroya og Eimskip leggja saman. – Ognarfelagið frá 1980, sum eigur feløgini aftanfyri skipini, er og verður eitt føroyskt felag burtur av, sigur hann**

BETA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er Ognarfelagið frá 1980, sum eigur partafelagið Beta í Saltangará. Beta rekur reiðaravirksemi og landingarmiðstøð, sum felagið eisini eigur. Ognarfelagið frá 1980 eigur eisini felagið, ið átti Handils-og Frystivirkið í Fuglafirði, sum í sínari tíð misti at kalla allar sínar ognir. Fýra av sonevndu kuba-trolarunum hava verið í felagnum Beta og fýra í felagnum, sum átti Handils- og Frystivirkið. Hesi bæði feløgini hava tó verið rikin sum eitt felag undir navninum, Beta sum nú eisini eiga nýggju trolararnar, Bak og Stelk.

Olaf Olsen, sum í fleiri ár var stjóri og reiðari, sigur, at Ognarfelagið frá 1980 hevur nøkulunda somu eigarar sum Skipafelag Føroya, tó eru ikki allir eigararnir teir somu.

Hann sigur, at hann t.d. eigur ein lítlan part í Skipafelag Føroya, sum hann tekur til, men einki í Beta.

### Onga ávirkan

Olaf Olsen sigur, at samanleggingin millum Skipafelag Føroya og Eimskip fær onga ávirkan á Ognarfelagið frá 1980, ið sum nevnt eigur Beta og felagið, sum átti Handils-og Frystivirkið.

– Her verður eingin sum helst broyting, og feløgini verða fult og heilt sum áður á føroyskum hondum. Við samanleggingini koma íslendingar tískil ikki at eiga lut í hesum feløgum, sigur hann.



*– Her verður eingin sum helst broyting og Ognarfelagið frá 1980, sum eigur feløgini aftanfyri skipini, verður fult og heilt sum áður á føroyskum hondum, sigur Olaf Olsen, sum eigur í Skipafelag Føroya, men einki í Beta*

## Aftur hall í ár

**– Vit økja ikki um ognirnar hjá feløgunum í løtuni, men brúka av likviditetinum, sigur Olaf Olsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Partafelagið Beta í Saltangará, sum hevur skiparakstur og landingarmiðstøð, hevði eitt lítið hall í rakstrinum í fjør, og soleiðis verður eftir øllum at døma eisini í ár.

Olaf Olsen væntar ikki, at tað fer at eydnast felagnum at fáa eitt yvirskot í raksturin í ár.

– Nei, eg vænti ikki, at raksturin fer at megna at gjalda øll avdrøg í ár. Sum er, økja vit ikki um ognirnar, men brúka av likviditetinum. Tí eru eisini allar útskiftingar av gomlum skipum útsettar til betri tíðir.

Hann sigur, at framhaldandi lági upsa-prísurin og hækkandi oljuprísurin gera, at raksturin ikki gongur betur.

### Upsin frægari

– Upsaprísurin fellur ikki meira í løtuni. Tann broyting, ið hevur verið, hevur verið til bata, men tað gongur ógvuliga striltið at fáa prísin uppeftir.

Hann sigur, at meðan teir nýggju trolararnir burtur av hava fiskað upsa, hava tey gomlu skipini eisini roynt eftir hvítum fiski.

– Men her eru nøgdirnar so mikið minni, at prísurin vigar ikki upp ímóti minkandi nøgdunum.

Upsafiskiskapurin hevur verið góður, og seinastu tíðina hevur annars so smái upsin verið heldur frægari til støddar.

### Vóna bata

Olaf Olsen heldur ikki, at nakar vandi er á ferð við skiparakstrinum hjá felagnum í løtuni, hóast raksturin nú eftir øllum at døma fer at geva hall tvey ár á rað.

– Vit mugu bara vóna, at umstøðurnar fara at batna sum árið líður, sigur hann.

Ragnar Olsen, sum er stjóri og reiðari hjá partafelagnum Beta, er í Spaniu, har nýggju trolararnir hjá felagnum, Bakur og Stelkur, eru til garantieftirlit.